


### Starvið

Vit bjóða tær avbjóðandi starv sum roknskaparleiðari, har tú fært ábyrgd av roknskaparligu viðurskiftunum á øllum Statoilstøðunum hjá P/F Statoil Føroyar.

Millum tíni ábyrgdarøki eru:

- Bókhald fyri Statoilstøðirnar
- Mánaðarroknskapir
- Fíggjarligar analysur
- Fíggjarætlanir
- Leiðsla og menning av deildini
- Lønarumsiting

Vit eru farin undir eina broytingartilgongd á fíggjarøkinum, og tú verður við til at menna og skipa innanhýsis mannagongdir.

Tú hevur beinleiðis tilvísing til fíggjarleiðaran, og tú verður eisini partur av leiðslubólkinum á fíggjardeildini.

### Deildin

Tú kemur at leiða roknskapardeildina, sum er partur av fíggjardeildini hjá P/F Statoil Føroyar á høvuðsskrivstovuni á Viðarnesi í Tórshavn. Á deildini hevur tú tvey starvsfólk afturat tær, og saman skulu tit skapa eitt toymi, har faklig dygd og gott arbeiðslag eru í hásæti. Tín deild hevur eisini tætt samband við Statoilstøðirnar kring landið.

### Tínir førleikar og eginleikar

Fyri at kunna røkja starvið best gjørligt er tað av týdningi, at tú hevur praktiskar royndir innan bókhald og fíggjarstýring og í at gera roknskapir, fíggjarligar analysur og fíggjarætlanir. Tú hevur eisini royndir við fíggjarskipanum, og tað er ein fyrimunur, um tú hevur royndir við Navision Attain.

Tú hevur tikið HH, HD ella aðra viðkomandi útbúgving.

Tú hevur gott yvirlit og dugir at arbeiða analytiskt og málrættað. Tú hevur góðar samstarvseginleikar, ert framtakssamur og tekur ábyrgd av teimum uppgávum, deildin skal loysa.

### Vit bjóða tær

Eitt avbjóðandi og spennandi starv, sum gevur tær góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning. Tær stendur í boði at luttaka á fakligum skeiðum – innanlands og uttanlands, bæði hjá Statoil samtakinum og øðrum. Lønin verður ásett eftir royndum og útbúgving. Eftirlønartrygging fylgir við starvinum.

### Umsókn

Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Sverra Kallsberg, fíggjarleiðara, á tlf. 34 35 00.

Skrivlig umsókn, við upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera okkum í hendi í seinasta lagi tann 31. mai.

Umsóknin skal stílast til:

**P/F Statoil Føroyar**
Postboks 3098
110 Tórshavn
Att. Sverri Kallsberg

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Endamálið hjá Statoil Føroyar er at veita brúkarunum kring Føroyar oljuúrdráttir og aðrar vørur. Hjá Statoil arbeiða umleið 150 fólk. Vit stremba eftir at veita bestu góðsku og tænastu, eins og umhvørvisábyrgd á øllum økjum er eitt av okkara fremstu málum.

STATOIL
*– fyri viðskiftafólk okkara*

REPROZ




Nú kanst tú keypa partabrøv, har trygd er fyri hvørjari krónu. Evropisk partabrøv uttan váða frá Kaupthing eru tryggjað ímóti halli, og tí fært tú altíð í minsta lagi ta áljóðandi upphæddina aftur. Evropiski búskapurin er í vøkstri. Samstundis eru evropisk partabrøv bíligari enn partabrøv úr øðrum heimspørtum, og møguleikarnir fyri vinningi eru tí góðir. Evropisk partabrøv eru sostatt ein samansparing, sum vil meira. Evropisk partabrøv uttan váða verða skrásett á føroyska virðisbrævamarknaðinum.

Tel 35 15 00 · Fax 35 15 01 · www.kaupthing.fo

KAUPTHING